**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Yvirlitstrolingar. Túrur nr. 1604.**
**Tíðarskeið: 17/2-2/3 - 2016**

**Fólk við frá Havstovuni:** Poul Vestergaard, Mourits Mohr Joensen, Marit Pedersen og Petur Steingrund.

**Ábyrgd:** Petur Steingrund.

**Endamál:** Hetta var fyrri túrurin av yvirlitstrolingunum á vári í ár. Høvuðsendamálið við túrinum var at fáa til vega tilfar, ið skal nýtast í stovnsmetingunum av toski, hýsu og upsa, t.e. veiða í vekt og í tali, longdarbýti, vektbýti, aldursbýti, kynsbýti og kynsbúning av nevndu sløgum. Umframt skuldi vekt, tal og longdarbýti skrásetast fyri øll fiskasløg, ið vórðu veidd. Eisini skuldu magakanningar gerast av toski, hýsu og upsa.

**Aðrar uppgávur:** Tilsamans 60 prøvar vórðu tiknir av gulllaksi til genetiskar kanningar.

**Reiðskapur:** 116 föts kassatrol við 40 mm meskum í posanum. Steinham lemmar. Breitlar 60 og 120 m.

**Um túrin:** Vegna vind fóru vit ikki út fyrr enn hósmorgunin 18/2 og tóku fyrst støðir eystan fyri Sandoynna og síðan støðirnar á Suðuroyarbanka og Sandoyarbanka og norðureftir. Fóru inn at landa mánadagin 22/2. Tóku síðan støðirnar lidnar eystanfyri og fóru á Norðhavið seinna vikuskiftið. Vit tóku allar støðirnar norðanfyri og á Mýlingsgrunninum. Tilsamans tóku vit 65 góðkendar støðir og bert tríggjar støðir mátti takast umaftur. Veðrið var til tíðir sjaskut, tó sera gott veður, tá vit vóru á Norðhavinum.

**Prøvatøka:** Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini og sýnishondbókini. Yvirlit yvir veiðu, nytrur og magar (Talva 1) er víst niðanfyri.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Túrurin var liðugt rættaður 14. mars. Ynskiligt er, at nytrurnar skulu vera lisnar og innlagdar í databasu í seinasta lagi 10. apríl.

**Fyribilsúrslit:** Tað var minni at fáa av toski, hýsu og upsa í mun til í fjør. Toskurin var ikki so væl fyri, tó at tað var væl av nebbasild fiskamagunum. Ein fullfiggjað samanbering við 2015 fæst við at hyggja at túrfrágreiðingini fyri túr 1606, har úrslitini fyri allar 100 støðirnar á føroyska landgrunninum eru víst. Listin við (fiska)sløgum er munandi longri í ár enn onnur ár. Hetta er tí at Havstovan er júst farin undir at skráseta korálur, svampar (ost), fiskireiðskap og nógv nýggj ryggleys djór, umframt fisk. Hetta varð áður skrásett undir ”skrambul”, men er nú munandi meira útgreinað. Eingin korál (Lophelia sp.) varð fingin í trolinum, men 28 kg av osti (Geodia sp.) og 60 kg av igulkerum vóru skrásett.

**Talva 1**. Veiða, nytrur og magar tiknir á túri 1604 (fyrra helvt av yvirlitstrolingini í mars 2016).

| SLAG | KG í 65 støðum | Nytrur | Magar | KG í 59 støðum í fjør | Lutfall KG per støð |
|---|---|---|---|---|---|
| HYSA | 5531.203 | 716 | 166 | 7684.416 | 0.65 |
| SVARTKJAFTUR | 5044.276 | | | 2002.521 | 2.29 |
| TOSKUR | 3996.396 | 684 | 172 | 6679.963 | 0.54 |
| UPSI | 3431.504 | 609 | 151 | 5201.509 | 0.60 |
| S. VIVIPARUS | 2778.885 | | | 2748.61 | 0.92 |
| HVITINGSBRODIR | 2355.127 | 5 | 5 | 2455.008 | 0.87 |
| GULLAKSUR | 2255.786 | 64 | | 1142.894 | 1.79 |
| SILVUR MURTUR | 1811.486 | | | 1066.244 | 1.54 |
| LONGA | 1101.403 | 101 | 30 | 1778.449 | 0.56 |
| HVITINGUR | 790.884 | | | 457.112 | 1.57 |
| S. MARINUS | 572.023 | | | 670.072 | 0.77 |
| KNURRHANI | 256.906 | | | 132.328 | 1.76 |
| REYDSPROEKA | 252.823 | 16 | 16 | 533.283 | 0.43 |
| TUNGA | 142.802 | 9 | 9 | 199.267 | 0.65 |
| BROSMA | 142.648 | 26 | 6 | 224.614 | 0.58 |
| GAMAL FISKUR | 112.377 | | | | |
| PORIFERA | 89.657 | | | | |
| HAVMUS | 79.094 | | | 91.669 | 0.78 |
| BLALONGA | 77.889 | 20 | 11 | 79.869 | 0.89 |
| HAVTASKA | 60.290 | | | 47.785 | 1.15 |
| ECHINIDAE(IGULKER) | 59.987 | | | | |
| S. MENTELLA | 56.451 | | | 55.634 | 0.92 |
| LYRUR | 56.255 | 9 | 5 | 86.415 | 0.59 |
| KJAFTSVARTI HAVUR | 51.165 | | | 125.271 | 0.37 |
| SANDSPROEKA | 49.269 | | | 50.282 | 0.89 |
| LOLIGO | 39.698 | | | 42.115 | 0.86 |
| ROGNKELSI | 37.577 | | | 14.165 | 2.41 |
| LINUREIDSKAPUR | 29.300 | | | | |
| GEODIA SP | 28.591 | | | | |
| HVASSASPREK | 24.830 | | | 23.016 | 0.98 |
| GLASKVOYSA | 22.869 | | | | |
| TINDASKOETA | 18.276 | | | 21.493 | 0.77 |
| JAKUPSSKEL | 15.455 | | | | |
| LALLA | 14.508 | | | 7.961 | 1.65 |
| STEINBITUR | 13.715 | | | 4.465 | 2.79 |
| MAKRELUR | 11.789 | | | 4.432 | 2.41 |
| LIRI | 10.450 | | | | |
| ASTERIIDAE | 9.929 | | | | |
| GLYSUFISKUR | 8.443 | | | 2.617 | 2.93 |
| ØDA | 7.564 | | | | |
| SKRAMBUL | 7.526 | | | 159.668 | 0.04 |
| HOLOTHUROIDEA | 7.343 | | | | |
| STEINAR(<20CM) | 6.578 | | | | |
| ØDA(DEYD) | 6.212 | | | | |
| AGNGAGGA(DEYD) | 4.096 | | | | |
| KALVI | 2.395 | | | 8.013 | 0.27 |
| AGNGAGGA | 2.130 | | | | |
| SILD | 1.828 | | | 23.784 | 0.07 |
| GAGGA(DEYD) | 1.696 | | | | |
| KUPUSKEL(DEYD) | 1.499 | | | | |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| PAGURUS BERNHARDUS | 0.958 | | | | |
| JÁKUPSSKEL(DEYD) | 0.852 | | | | |
| NEBBASILD | 0.807 | | | 0.187 | 3.92 |
| ELEDONE | 0.750 | | | | |
| GAGGA | 0.609 | | | | |
| ALCYONIUM | 0.570 | | | | |
| SOLASTERIDAE | 0.508 | | | | |
| KJAFTSVARTI KONGAFISKUR | 0.485 | | | 2.204 | 0.20 |
| PHAKELLIA SP | 0.335 | | | | |
| BRISLINGUR | 0.240 | | | | |
| PAGURUS PUBESCENS | 0.154 | | | | |
| PURPURIGULKER | 0.141 | | | | |
| HYDROIDA(GRAS) | 0.098 | | | | |
| BIVALVIA(DEYD) | 0.093 | | | | |
| HYAS COARCTATUS | 0.083 | | | | |
| TRØLLAHUMMARI | 0.068 | | | | |
| PLASTIKK | 0.059 | | | | |
| LODNA | 0.037 | | | | |
| CLATHRIIDAE | 0.012 | | | | |
| BIVALVIA | 0.011 | | | | |
| ORMUR | 0.009 | | | | |
| TILSAMANS | 31497.762 | 2259 | 571 | | |

**Viðmerkingar:** Viðmerkingar (smálutir av ymsum slagi) til túrin eru skrivaðar í Tur1604d.doc.

Petur Steingrund